# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Vit vilja ikki vita av George W. Bush, tí hann hevur illar andar við sær*
*(indianarahøvdingi í Guatemala)*

# Krevja at sleppa at vitja bukaðan andstøðuleiðara

**Evropeiskir diplomatar í Zimbabwe krevja at sleppa at vitja andstøðuleiðaran Morgan Tsvangirai, sum sambært andstøðuni er bukaður í varðhaldinum hjá løgregluni**



*Morgan Tsvangirai. Andstøðan sigur, at hann bleiv bukaður í varðhaldinum.*

Morgan Tsvangirai, sum er formaður í andstøðuflokkinum MCC, varð tikin sunnudagin saman við nøkrum av sínum næstu medarbeiðarum. Teir hildu fund í høvuðsstaðnum Harare, tá løgreglan brádliga tók teir.

Í gjár vildu umboð fyri andstøðuna vera við, at Morgan Tsvangirai var fluttur á eitt sjúkrahús við løstum, sum hann hevði fingið í varðhaldinum. Aðrir fangar høvdu greitt frá, at fýra løgreglumenn høvdu bukað andstøðuleiðaran, sum millum annað hevði fingið løstir í høvdið. Onkur tíðindastova skrivaði, at Morgan Tsvangirai hevði mist vitið.

USA og fleiri lond í Vesturheiminum fordømdu í gjár framferðina hjá zimbabwisku myndugleikunum.

- Robert Mugabe, forseti, og stjórn hansara hava ábyrgdina av tí, sum er hent, og forsetin og stjórnin skulu síggja til, at andstøðupolitikararnir fáa virðiliga viðferð, og at teir verða latnir leysir alt fyri eitt, stóð í boðunum frá amerikanska uttanríkisráðnum.

ST-aðslskrivarin, Ban Ki-moon, hevur eisini kravt, at Morgan Tsvangirai og hinir andstøðupolitikararnir verða latnir leysir beinanvegin. Tað sama sigur ES, sum leggur afturat, at stýrið hjá Robert Mugabe, forseta hevur ábyrgdina av vælferð teirra.

Í gjár royndu nakrir evropeiskir diplomatar at sleppa at tosa við Morgan Tsvangirai, men løgreglan vísti teimum burtur. Doplomatarnir skuldu royna aftur í dag. Talsmenn hjá andstøðuni siga, at løgreglan hevur fingið boð um at fjalda andstøðuleiðaran, til hann er komin fyri seg aftur eftir ta ringu viðferðina í varðhaldinum.

## STUTT SAGT

### Tingast ikki

Týska stjórnin hevur gjørt greitt, at hon fer ikki at tingast við teir, sum burturfluttu eina týska kvinnu og son hennara í Irak fyri einum mánað síðani. Burturflytararnir hava hótt við at taka tey bæði av døgum, um Týskland ikki tekur sínar hermenn og løgreglumenn úr Afghanistan. Í síðstu viku kunngjørdu burturflytararnir eina sjónbandsupptøku, har teir báðir gíslarnir bóðu Týskland eftirlíka kravinum frá burturflytarunum. Men stjórnin í Berlin slakar ikki. Ein talsmaður hennara segði í gjár, at teir týsku hermenninir og løgreglumenninir verða verandi í Afghanistan. Týskland hevur umleið 3.000 mans í altjóða herdeildini í Afghanistan.

### Gevst ikki so

Forsetin í Zimbabwe, tann 83 ára gamli Robert Mugabe, sigur seg nú vera til reiðar at taka eitt tørn afturat í forsetaembætinum. Verandi forsetaskeið rennur út í 2008, og Mugabe sigur við blaðið Herald, at hann er sinnaður at taka eitt skeið afturat, um hansara stuðlar taka undir við tí. Mugabe hevur verið forseti í Zimbabwe, síðani landið fekk sjálvstýri í 1980, men tað er synd at siga, at hann hevur verið heppin sum ríkisleiðari. Zimbabwe er í politiskari og búskaparligari kreppu, og landið, sum einaferð var eitt tað ríkasta í Afrika, er nú millum tey fátæku.

### Lovar hjálp

Amerikanski forsetin, George W. Bush, lovaði í gjár at veita suðuramerikanska landinum Kolombia munagóða hjálp í bardaganum ímóti teimum sterku rúsevnaharkaliðunum í landinum. ST metir, at umleið 600 tons av kokaini koma úr Kolombia um árið, og amerikanski marknaðurin er tann, sum keypir mest. Tey seinastu árini hevur USA veitt Kolombia stóra hernaðarhjálp til bardagan ímóti rúsevnaharkaliðunum, og hendan hjálpin fer at halda fram, segði Bush, tá hann vitjaði í Kolombia í gjár.

# Tá kongur er næsti maður Guðs

*Oliver Jufer á veg í rættin í gjár*



**Sveisarin Oliver Jufer kann fáa 75 ára fongsul fyri at hava oyðilagt tvær myndir av teilendska konginum**

Oliver Jufer varð tikin har norðuri í Teilandi tann 5. desember. Hann var drukkin og hevði í fyllskapi oyðilagt tvær myndir av teilendska konginum, Bhumibol.

Tað skuldi hann ikki havt gjørt. Bhumibol, sum hevur verið kongur í Teilandi seinastu seksti árini, er ikki bara kongur, men sambært teilendskari siðvenju næsti maður Guði, og í grundlógini stendur beinleiðis, at ongum er loyvt at niðra kong.

Tað gjørdi tann 57 ára gamli Oliver Jufer, og sambært lógini kann hann fáa upp í 75 ára fongsul. So harða revsing fær hann ikki, tí hann hevur játtað seg sekan, men verji hansara sigur við Reuters, at Oliver Jufer sleppur ikki undan fongsulsrevsing.

Dómur fellur í málinum 29. mars.